FÓLKATINGSVALIÐ 2001

Avgerð og ábyrgd er okkara

Sylverius Jacobsen
valevni Javnaðarfloksins

Góðu landsmenn og kvinnur. Um eg nú spyrji tykkum: eru vit føroyingar ein tjóð, so finst neyvan ein einasti tykkara millum, sum ivast í tí. Og hetta er eisini av av grundarsteinunum fyri politiska virkseminum hjá Javnaðarflokkinum, at Føroyar eru tjóð, og at tað er ikki bara okkara rættur, men eisini okkara skylda, sjálvi at gera av, hvussu vit skipa okkara samfelag inneftir og viðurskiftini úteftir við onnur lond. Hetta er ikki ein rættur vit biðja donsku stjórnina, ST ella nakran annan um. Hesi tjóðarrættindi eiga vit, eisini í tí ríkisfelagsskapi, sum vit eru ein partur í. Hóast aðrir gera tað til sína politisku missión at skapa rumbul og hurlivasa burtur úr okkara støðu sum tjóð, so er tað kortini fullkomiliga greitt, at tað sum vit vilja, tað avgera vit sjálv, og eingin forðar okkum í tí. Um tað t.d. nú var so, at fjøldin av Føroya fólki stóð aftan fyri eitt politiskt ynski um at fara úr Ríkisfelagsskapinum og skipa okkum sum sjálvstøðugt ríki, ella skipa okkum sum ein sjálvstøðug tjóð innan fyri ríkisfelagsskapin, so forðar eingin okkum í tí. Tað kann verða júst so, sum vit sjálv vilja. Tað var júst tað, sum eisini varð staðfest samtykt á fólkatingi tann 10. mai 2001, sum meir enn 90% av tinglimunum atkvøddu fyri.

Tað er okkara mál og tað er eisini okkara ábyrgd at virka fyri, at Føroyar koma at standa á egnum beinum, búskaparliga og politiskt. Tað er so sjálvsagt, at tí hava vit brúk fyri altjóða samstarvi, og vit hava brúk fyri norðurlendskum samstarvi. Men serliga hava vit brúk fyri einum tøttum samstarvi í ríkisfelagsskapinum. Her hava vit í dag stórar ítøkiligar fyrimunir á t.d. útbúgvingarøkinum, sum sjálvandi fyrst og fremst er av veldugum týdningi fyri okkara unga fólk. Og vit hava fyrimunir á arbeiðsmarknaðinum, á tí sosiala økinum, á sjúkrahús- og heilsuøkinum. Í øllum hesum málum o.ø. við tykist tað okkum skilaleyst av avsiga okkum hesi rættindi, við at avsiga okkum samstarvið í ríkisfelagsskapinum.

Í Javnaðarflokkinum eru vit fullgreið yvir, at tað verður eitt strævið og tógvið stríð at vinna Føroyum búskaparligt sjálvbjargni við einum minkandi ríkisstuðli, samstundis sum vit skulu ikki bert varðveita, men eisini betra um tað føroyska vælferðarsamfelagið. Tí hava vit brúk fyri góðum og tøttum samstarvi í ríkisfelagsskapi – eisini fyri at eiga møguleikan at finna einstakar og solidariskar loysnir, tá tær ytru umstøðurnar, náttúran ella marknaðurin ikki eru okkum til vildar.

Hetta samstarvið vil Javnaðarflokkurin fremja í einum broyttum og meira rúmsáttum ríkisfelagsskapi ímillum sjálvstøðug og javnbjóðis lond.

Ongin í Danmark hóttir Føroyar!

Hví skulu núlivandi føroyingar tá gjalda ein ovurprís fyri fullveldið?

Birgir Mohr
Valevni Javnaðarfloksins

Javnaðarflokkurin sigur: Fólkið fyrst og fremst – samstarv við aðrar flokkar her á landi og við danir fyri at finna loysnir – ikki klandur og konfrontatións-politikk á fólkatingi!

Fólkið fyrst merkir, at Javnaðarflokkurin vil ikki ofra vælferðina fyri at framskunda fullveldið ella loysingina, tá tað er ein óneyðuga høgur prísur at gjalda fyri eitt fullveldi á pappírinum, sum vit álíka væl ikki megna at umsita her og nú.

Sjálvstýri og sjálvbjargni eru tilgongdir, sum fylgjast, og sum hava ment seg í Føroyum síðan vit fingu heimastýrislógina í 1948.

Tá eingin hóttir okkum úr Danmark, so er eingin orsøk til at framskunda sjálvstýristilgongdina meira, enn vit orka at gjalda, uttan at tað fer at kosta okkum vælferðina hjá fleiri ættarliðum av føroyingum.

At avseta pening til fullveldið her og nú ella loysing, so leingi vit ikki megna at gjalda eina sømuliga fólkapensión? Hví frásiga okkum pening úr Danmark uppá fleiri hundrað milliónir krónur um árið, soleingi vit ikki megna at gjalda fyri eitt virðiligt støði undir: Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum, Skúlaverkinum, samferðslukervinum o.s.fr.?

Javnaðarflokkurin sigur nei til hendan politikkin! Javnaðarflokkurin sigur fólkið og tess vælferð fyrst. Og við fólkið meina vit tey, sum liva í dag. Vit, sum liva í dag, krevja eitt rímuligt vælferðarstøði, og vit vilja fyrst síðan hava ein varligan sjálvstýris- og sjálvbjargnispolitikk.

Ongin í Danmark hóttir okkum føroyingar ella okkara vælferð. Nei, hóttanin kemur úr Føroyum frá tí politikki, sum landsstýrissamgongan førir í løtuni. Hesin politikkur endar ikki væl, og eigur tí at verða skiftur út við ein betri politikk. Latum okkum til hetta valið siga eitt greitt nei til fullveldispolitikkin – til loysingarpolitikkin!

Gerið hetta við at velja Javnaðarflokkin. Javnaðarflokkurin sigur: fólkið fyrst – fólksins vælferð fremst.

Gott val.

Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin farnir í eljustríð???

Jákup Lamhauge
Valevni Sambandsfloksins

Í tíðindasendingunum hóskvøldið frættist, at álvarsamt stríð hevur tikið seg upp millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin – ja ein fekk næstan fatan av, at kríggstøða hevur tikið seg upp millum hesar flokkar – spurningurin var bara nær skotriðurnar fóru at hoyrast.

Onki er at ivast í, at Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin standa í eini sera spentari støðu upp undir fólkatingsvalið – hesir flokkar kunnu ikki koma uttan um, at teir ikki hava Føroya fólk aftan fyri seg í fullveldismálinum – hetta siga mongu veljarakanningarnar, sum verið hava um henda álvarsama spurning.

At tað má svíða sárt hjá hesum báðum flokkum, at Føroya fólk ikki tekur undir við høvuðsmáli teirra seinastu árini – nevniliga fullveldismálinum, er eyðvitað, og tí ræður nú um at finna snildar leiðir til tess at vinna veljarafjøldina aftur til fólkatingsvalið.

Alt bendir nú á, at hesir flokkar hava gjørt avtalu um at vera ósamdir í valstríðnum upp til fólkatingsvalið fyri á hendan hátt at skapa falskan spenning millum veljarar teirra – samstundis sum hetta skal vera við til at leiða huga føroysku veljaranna burtur frá hinum flokkunum – alt skal síggja út sum valstríðið einans er millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin – tað er bert fyri hesar flokkar, at fólkatingsvalið fer at snúgva seg um.

Havandi í huga politisku gongdina seinastu árini, meðan Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin ímóti viljanum hjá stórum meiriluta av Føroya fólki hava brotið niður stóran part av aldargamla ríkisfelagsskapinum og nú framhaldandi við ódámligum snildum royna at vinna veljarafjøldina til fólkatingsvalið, so er tíð at rópa hart varskó til Føroya fólk um at vera á varðhaldi.

Allir samríkishugaðir føroyingar mugu nú standa fast saman um at verja borg – Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin mugu ikki fáa loyvi at bróta meira niður enn teir higartil hava gjørt.

Samríkismenn og -kvinnur, takið lógvatak saman við Sambandsflokkinum, so flokkurin aftur fær sæti á Fólkatingi og harvið møguleika at menna samstarvið aftur í ríkisfelagsskapinum.

Spurningur til Sambandsflokkin

Jógvan Sundstein
fólkatingsvalevni
Fólkaflokksins

Í valstríðnum til fólkatingsvalið hevur sambandsflokkurin sett upp 3 høvuðsspurningar. Teir eru: Ríkisfelagsskapurin, Persónligt frælsi og Vælferðin. Formaður flokksins segði í útvarpsorðaskifti, at ríkisfelagsskapurin var fortreytin fyri, at vit her á landi kundu hava persónligt frælsi og nøktandi vælferð.

Eg skal tí loyva mær at spyrja sambandsflokkin:

1. Hvat er ríkisfelagsskapurin (sum føroyingar ongatíð hava limað seg í)? Er hann synonymur við donsku ríkisveitingarnar? Ella við rættindi til útbúgvingar og heilsuhjálp í Danmark? Hesi rættindi kunnu vit hava í fleiri øðrum londum.
2. Kunnu føroyingar ikki njóta persónligt frælsi, uttan at vera í rikisfelagsskapi við Danmark? Hvat við t.d. norðmonnum, íslendingum, finnlendingum? Hesar tjóðir hava áður verið saman við øðrum londum, men eru nú fult sjálvstøðugar. Hava hesar tjóðir ikki persónligt frælsi? Ella eru føroyingar eitt so niðurundirkomið fólkaslag, at teir ikki klára sjálvir at skipa fyri persónligum frælsi í sínum egna landi?
3. Er føroyska vælferðin bert grundað á ríkisfelagsskapin ella er hon grundað á tað, sum føroyingar sjálvir megna? Um svarið er tað fyrra, hví skulu vit so sjálvir royna at skapa búskaparligan vøkstur? Danir rinda jú kortini? Hvussu ber tað til, at flestu lond um okkara leiðir, sum ikki eru í ríkisfelagsskapi við Danmark, hava eitt betur vælferðarsamfelag enn Danmark?

FÓLKATINGSVALIÐ 2001

Einki gott hent millum 1948 og 1998?

Thomas Arabo
Fólkatingsvalevni
Javnaðarflokksins

Samráðingarnar um fullveldisætlanina hava verið millum Føroya Landstýri og donsku stjórnina. Eitt úrslit fyrilá, men Føroya Landsstýri tordi ikki at taka av. Soleiðis er tað, og ikki nyttar at senda Fólkatingsumboð niðuraftur at trevsa uppaftur í einari miseydnaðari ætlan, ið harafturat ikki hevur breiða undirtøku. Nú ræður um at velja umboðan, ið kann saðla um og fáa framdrift í málið, tí greitt er, at alt ella einki politikkurin hevur sligið feil.

Týdningarmikið er, at tann vongurin í føroyskum politikki, ið trýr uppá at menna Føroyska samfelagið eftir samhaldsføstum virðum, arbeiðir saman. Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin arbeiddu væl saman eitt nú í sjeytiárunum, har nøkur av stórstu stigunum á sjálvbjargnisleið vóru tikin, hóast yngra ættarliðið í Tjóðveldisflokkinum einki gott sær millum 1948 og 1998. Vit - og ikki minst nýggja leiðslan í Tjóðveldisflokkinum - mugu minnast til, at tað ikki eru meira enn 30 ár síðani, at hvør skúlatekning skuldi góðkennast av ríkisumboðininum. Einki er komið av sær sjálvum tey seinastu 50 árini.

Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin sótu eisini saman við róðrið, tá nøkur av tyngstu tøkunum í kreppuni vóru tikin. Eg trúgvi uppá eina semju millum Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin, tí tað má vera betur hjá fullveldismonnum at koma hálva leið heldur enn onga leið. Við at halda fast um eina ætlan, ið ikki ber til, tryggjar Tjóðveldisflokkurin saman við Sambandsflokkinum, at vit ongan veg koma á sjálvbjargnisleið.

Við at velja Javnaðarflokkin til Fólkatingsvalið tryggjar tú eina hóvliga leið eftir einum samhaldsføstum leisti. Vit vilja royna at samla vinstravongin aftur, tí tað gagnar bert høgravonginum, at vinstrivongurin í føroyskum politikki ikki stendur saman.

Tjóðveldisflokkurin borgar fyri búskaparligum tryggleika

Karsten Hansen
Fólkatingsvalevni
Tjóðveldisflokksins

Hvussu skjótt gloyma fólk? Ella rættari: Hvussu skjótt vilja sambands- og javnaðarpolitikarar hava fólk at gloyma?

Fyri fýra árum síðani grettu hesir flokkar ikki eitt orð um pensiónir, eldrarøkt, sjúkrahús og skúlar. Alt var niðurpínt, hóast teir brúktu allan blokkstuðulin við rubb og stubb. Ongin hevði ánilsi av, hvar vit flutu fíggjarliga og búskaparliga. Ikki ein landsroknskapur varð gjørdur fleiri ár aftur í tíðina.

Hinir flokkarni kundu ikki gretta orð um nakrar sum helst betringar, tí har vóru ongir pengar at fíggja teir við.

Síðani Tjóðveldisflokkurin tók við fíggjarligu leiðsluni í landinum hava vit fingið fullfíggjaðar landsroknskapir og ruddað upp í roknskapunum heilt aftur til 1995.

Síðani tjóðveldisflokkurin tók við fíggjarliga stýrisvølinum hava vit bert brúkt uml. 380 mió. av donskum blokkstuðli um árið til at reka hetta samfelagið. Og kortini eru ongantíð størri sosialar og samfelagsligar betringar gjørdar í landinum.

Almannøkið hevur fingið 300 mió. krónur afturat og hevur ongantíð fingið so stóra játtan.

Sjúkrahúsøkið hevur fingið 114 mió. kr. afturat. Og nýtt landssjúkrahús verður smíðað - sum ein og hvør kann síggja.

Mentan, skúli og gransking hava fingið 180 mió. kr. afturat - og hetta er tað hægsta nakrantíð.

Pensiónir og lestrarstuðul eru hækkaði meira enn nakrantíð fyrr. Barsilsskipan, nýggj dagpeningalóg fyri tímalønt og avtøka av øllum karensdøgum er framt.

Fakfeløgini, sum fyri 4 árum síðani ikki høvdu fingið lønarniðurskurðin í ríkisfelagsskapinum aftur, hava fingið betrað sáttmálarnar meira enn nakrantíð í Føroya søgu.

Hartil eru skip, tunnlar og vegir bygdir eftir einari langtíðarætlan, sum okkara egni búskapur kann bera.

Nú hava vit møguleika at halda fram við einum veruligum búskapi og betra eldrarøkt, bústaðir til brekað og mangt annað, sum hevur verið forsømt í heimastýrinum.

Vit hava verið vælsignað frá skaparanum og hava tikið við tí ábyrgd okkum er givin. Alt hetta er møguligt, orsakað av einum dugnaligum vinnulívi og dugnaligum arbeiðsfólki bæði hjá tí privata og almenna. Tað er gjørt við einum neyvum fíggjarpolitikki uttan at brúka meira blokkstuðul. Hetta er gjørt við fullveldispolitikki.

Nú kappast andstøðuflokkarnir um at sleppa framat at brúka teir pengar og teir møguleikar, sum bara ábyrgdin við fullveldispolitikkinum hevur skapt. Nú vilja teir á fólkating at kæra sína neyð og ætla at biða danir fíggja sín ábyrgdarleysa politikk. Tað fer at koyra hetta landið lúkst á heysin aftur - og so fær palliba aftur rokningina.

Og tað fer aftur at skapa vanvirðing fyri føroyingum.

Eg havi fundast nógv við mínar norðurlendsku starvsfelagar - fíggjarmálaráðharrar úr øllum hinum londunum. Teir hava alstóra virðing fyri tí ótrúligu broyting, sum er farin fram í føroyska búskapinum seinastu 4 árini.

Ein tjóðveldisrødd á fólkatingi fer at skapa somu virðing millum danir og danskar politikarar - tá tingini verða sødd, so tey venda rætt.

Fuppnummarið við sjálvsavgerðarrættinum

Jóannes Eidesgaard
fólkatingsmaður

Tað er ikki dagur frá Guði, at tjóðveldisfólk ikki harmast um, at danir ikki vilja viðurkenna okkara sjálvsavgerðarrætt. Men hetta er ikki bara skeivt, men hetta er ein beinleiðis villleiðing av fólki, og tað uttan mun til, um hetta verður sagt av lærdum ella leikum. Í valstríðnum hava vit enntá fingið at vitað frá Tjóðveldisflokkinum, at hann, um hann fær umboðan á Fólkatingi, er til sølu til ta stjórn, sum vil viðurkenna henda sjálvavgerðarrætt, sum vit frammanundan eiga. Teir selja teirra politisku sál til lægstbjóðandi.

Tá tjóðveldisfólk tosa so nógv um henda góða sjálvavgerðarrætt, so lat okkum fyrst hyggja at, hvat hesin rættur inniber. Hann merkir, at tað eru føroyingar sjálvir, sum við t.d. einari fólkaatkvøðu gera av, hvussu viðurskiftini verða skipaði við eitt nú loysing, framhaldandi samstarvi ella kanska onkrum heilt øðrum. Og hesin rættur kann sjálvandi brúkast meira enn einaferð. Hann er ómissandi.

Fólkatingið samtykti 10. mei í ár næstan einmælt, at tað er føroyingar sjálvir, sum gera av, hvussu framtíðar viðurskiftini verða millum londini, uttan mun til, um talan verður um fullveldið ella framhaldandi samstarv í ríkisfelagsskapinum. Hetta merkir, at Fólkatingið hevur viðurkent okkara sjálvsavgerðarrætt.

Men annars er sjávsavgerðarrætturin okkara ein sjálvsagdur rættur. Hesin rættur er ómissandi, so leingi sum Føroya fólk og Føroyar sum land eru til. Hesin sjálvavgerðarrættur er fyrst og fremst ein spurningur um sjálvsfatan. Hann kemur frá hvørjum einstøkum av okkum, og vit uppfylla øll saklig kriterier fyri at eiga henda sjálvavgerðarrætt, sum eingin kann taka frá okkum. Hetta vita allir føroyingar - kanska burtursæð frá tjóðveldisfólki, sum eru teir einastu føroyingar, sum ikki vilja trúgva hesum uttan so, at danir siga okkum, at soleiðis og soleiðis er tað.

Hugsið tykkum til, at baskararnir fóru at spyrja spaniólar, um teir áttu ein sjálvsavgerðarrætt!

Harumframt so eiga vit eisini sjálvavgerðarættin sambært altjóða fólkarætti. Sambært keldum, sum m.a. tjóðveldisfólk vísa til, so sigur kendi íslandski fólkarættarfrøðingurin, at har er eingin ivi.

Men hvat er so trupulleikin góðu tjóðveldisfólk?

Jú, eg skilji tykkum partvíst. Hetta er seinasta hálmstráið, sum tit nú krøkja tykkum í, tí alt annað er farið. Fullveldið forkomu tit sjálvir, tí tit tordu ikki, tá tilboðið við 4 árum lá á borðinum. So í neyðuni taka tit hetta fram aftur og aftur og vóna harvið, at fólk skulu trúgva tykkum. Men hetta er bara ikki so. Tit mugu royna okkurt annað.

Og hvat skal eitt umboð frá Tjóðveldisflokkinum gera á Fólaktingi? Jú, júka uppí saman um, at teir vilja hava danir at viðurkenna ein rætt, sum teir hava viðurkent, men har tað fyrst og fremst telur, hvørjum vit sjálvir trúgva.

Sjálvavgerðarrætturin er okkara uttan mun til, hvat Høgni ella Nyrup í teirra orrustum siga.